# Alternativ bygging á Norðoyri

Vísandi til kunngerð nr. 122 frá 22 des. 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn, verður eitt øki á Norðoyri – omanfyri vegin, sunnanfyri bygdina – boðið út til bygging.

Boð saman við uppskoti um bygging verða at senda til:

**Klaksvíkar kommuna**
Postsmoga 2
FO-700 Klaksvík

í seinasta lagi 20. juni 2006.

Lendið, sum verður útboðið í fyrstu atløgu, er 6.200 m², íroknað vegir.

Seinni er ætlanin at bjóða enn eitt øki út uppá 7.500 m², íroknað vegir, til sama endamál.

Kommunan ger vegin, sum hoyrir til økið og skilar sær rætt til at selja økið til ein ella fleiri keyparar.

Minsti kostnaður fyri lendið er ásettur til kr. 240,- pr. m².

Ætlanin er, at á økinum skulu byggjast tví – ella raðhús í alternativum sniði, sum tó falla væl inn í lendið. Byggingin skal sjálvandi lúka ásetingarnar í verandi byggisamtykt fyri Klaksvíkar kommunu.

Eisini skulu atlit takast til verandi umhvørvi. Her verður serliga hugsað um verandi grótgarð sum ætlanin er at byggja uppaftur.

Við tilboðnum skal fylgja skitsuuppskot til bygging.

**Byggiætlanin skal fremjast við byggifreistum:**
- Byrja í seinasta lagið ½ ár eftir projekt-góðkenning
- Ávegis byggifreistir fyri samanhangandi partar av projektinum
- Ásett freist fyri endaliga liðugtgerð

Verða freistirnar ikki hildnar, verður lendið at lata aftur til kommununa móti mettari samsýning.

Áðrenn møguligur sáttmáli verður undirskrivaður, skal fyriliggja váttan frá peningastovni um fígging.

Nærri kunning um byggiætlanina og útbjóðingartilfar kann fáast við at venda sær til Teknisku Umsiting – Hanus Poulsen ella Berg Viderø á tlf. 410000.

# Økispedagogur til Dagrøktarskipanina í Runavíkar kommunu

Søkt verður eftir pedagogi í farloyvisstarv, 30 tímar um vikuna frá 1. juni 2006 til 1. juni 2007.

**Um Dagrøktarskipanina**
Dagrøktin er ein kommunal skipan undir Runavíkar kommunu. Dagrøktin er normerað til 90 børn.
Í dagrøktini starvast 21 dagrøktarar, 1 spælistovufólk og ein leiðari.
Spælistova er knýtt at dagrøktini.

**Arbeiðuppgávurnar eru m.a.**
- at vitja dagrøktarheim, veita ráðgeving og hava eftirlit
- at virka fyri at starvsfólk trívast og mennast
- at tryggja námsfrøðiliga tilboðið eftir tørvinum hjá tí einstaka barninum og teimum treytum, sum skipanin virkar undir
- skrivstovuarbeiði

**Vit leita eftir fólki, ið**
- er útbúgvin pedagogur
- hevur góð samstarvsevni
- er nýhugsandi og ígongdsetandi
- kann arbeiða sjálvstøðugt

**Setanarviðurskifti**
Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

**Fleiri upplýsingar**
Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Jákup H. Foldbo sosialdeildarleiðara á tlf. 417000 ella Dagrøktarleiðaran á tlf. 448594 lok. 10

**Søk starvið**
Við at senda okkum eina umsókn í seinasta lagi mánadagin 29. mai 2006, kl. 12:00.

*Umsóknin skal sendast til:*

Runavíkar Kommuna.

**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Heiðavegur 26
Postrúm 139
FO-600 Saltangará



## Lærarastørv í Viðareiðis Skúla

Tíðaravmarkað størv skúlaárið 2006/2007 í Viðareiðis Skúla verða lýst leys til setan frá 1. august 2006

***Søkt verður eftir:***
· einum lærara til fulltíðarstarv
· einum lærara til avlopstímar. Starvið er umleið 14 tímar um vikuna. Endaliga tímatalið verður fastsett í september.

***Tey, ið sett verða skulu:***
· undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiði skúlans
· duga at samstarva
· verða fús at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
· verða við til áhaldandi at menna skúlan

***Skúlanum tørvar lærarar, ið m.a. kunnu átaka sær:***
· flokslærarauppgávu
· undirvísa í føroyskum, donskum og enskum
· undirvísa í handaligu lærugreinunum
· undirvísa í ítrótti
· undirvísa í kristni
· serligan tørv
· kt

***Førleikakrøv***
Lærarаútbúgving ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum. Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

***Løn***
Lærarastørvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4.

***Umsóknir***
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 2. juni kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Jensebeth Absalonsen, skúlaleiðara á tlf. 45 11 80 ella 58 80 52.

**Viðareiðis Skúli**
Fo – 750 Viðareiði
Tlf. 451180 – 588052
Teldupostur: vid@skulin.fo

*Viðareiðis skúli hevur komandi skúlaár 48 næmingar frá 1. – 7. flokk í fýra flokkum og 6 lærarar.*

*Viðareiðis skúli er ein nútímans skúli við góðum umstøðum bæði fyri næmingar og lærarar.*

**Søkt verður eftir mekanikara/maskinsmiði til verkstað okkara.**

Arbeiði fevnir um, at hava dagligu leiðsluna av verkstaðnum har afturat kundarøkt, umvælingar, servisu v.m.

Umsøkjarin má verða mekanikari ella hava aðra viðkomandi útbúgving.

sp/f
**O.K.**
**HEILSØLA & MASKINUR**

**Handilin á kajuni í Hvalvík • Tel. 422 394 • www.okheilsola.com**

Hugnaligt tiltak fyri alla familjuna leygardagin

# BÁTASTEVNAN Í HØLLINI

**Opið frá kl. 15.00**

**Stórt og gott tombola**
við nógvum góðum vinningum

**Bóltkast, við ferðmátara**
vinnarar fáa heiðursmerki

**Kaffisøla**
v/onkrum góðum afturvið

**Poppkorn Fiskibrunnur Seymsláing**

**Sunnumorgunin frá kl. 8.00 til 10.00 eru rundstykkir til keyps á camping økinum Inni á Fjørð og við bátabrúgvarnar við Havnaskrivstovuna**

**Føroya meistarar**
**2004 · 2005 · 2006**

**Steypavinnarar**
**2003 · 2004 · 2005 · 2006**

**Ongan taptan dyst síðani**
**Okt. 2003**

**Her eru nakað av tí vit hava at bjóða familjum við børnum á bátastevnuni**
**Við tøkk fyri stuðulin.**
**Gentur 14**

Sosialurin
www.sosialurin.fo